tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 56 týsdagur 21. mars 1995 69. árgangur Krónur 7,00

**HONDBÓLTSDÓMARAR SETTU LÍVIÐ Í VÁGA Á VEG HEIM ÚR VESTMANNA:**

# Sótu fastir á oynni í seks tímar í kavaroki



*Eftir at hava verið í Vestmanna og dømt »týdningarleysa« dystin millum VIF og Kyndil, komu Trygvi Mortensen og Uni Hansen úr Runavík illa fyri á veg heim, og teir máttu gista í Hvalvík. Tá teir vóru aftur í Runavík, høvdu teir verið frá húsum í yvir eitt samdøgur* **síða 15**

**SVEND KROSSTEIN, fyrrv. nevndarlimur í gamla Føroya Banka:**

## Leiðslan noktaði at siga nevndini frá



*Lesið samrøðu á síðu 6*

**EINGIN SEMJA Í EYGSJÓN MILLUM FAKFELØGINI OG LANDSSTÝRIÐ:**

## Vænta nú umfatandi arbeiðssteðg

**síða 3**

**LØGMAÐUR BOÐIN TIL HETLANDS Á VITJAN**

*Lesið á síðu 8*

**IVAN JOHANNESEN, fiskimálaráðharri:**

## Vónbrotin av føroyska vinnulívinum

**síða 10**

# HAVNAR BIO

★ Tlf. 11956 ★




Tyskv. 21.03 og mikukv. 22.03 kl. 22⁰⁰

- Bedre underholdning kan det nye biografår ikke begynde med

Bruce Willis og Jane March




Tyskv. 21.03 og mikukv. 22.03 kl. 20⁰⁰




Tyskv. 21.03 og mikukv. 22.03 kl. 19⁰⁰




Tyskv. 21.03 og mikukv. 22.03 kl. 22⁰⁰




havnar bio

við Meryl Streep kemur fríggjadagin 24.03.

★ BIO KIOSKIN ★

Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti o.m.a.


*Bretar vilja hava størri samstarv við føroyingar:*

# Løgmaður boðin til Hetlands á vitjan

*-Tað er upp á hægstu tíð, at Føroyar og Bretland fáa knýtt tættari politisk sambond og fáa samarbeiði í lag millum londini, ikki minst nú oljuvinna er við at taka seg upp á leiðunum millum Føroyar og Hetland heldur Johan Mortensen, bretsku konsul*



*Johan Mortensen, fiskaútflytari og bretskur konsul í Føroyum dylur ikki fyri, at tørvur er á størri samstarvi millum Føroyar og Bretland bæði á fiskivinnu- og oljuvinnuøkinum. Her tekur hann ímóti leiðandi bretskum oljufólkum, sum vitjaðu í Føroyum í fjør. Attanfyri bretski sendiharrin í Danmark. Mynd kalmar*

Edmund Joensen, løgmaður varð í gjár boðin at vitja í Hetlandi. Tað vóru tvey hetlendsk umboð, sum komu við hesi innbjóðing á fundi í Tinganesi seinnapartin í gjár.

Tey bæði umboðini eru Peter Malcomson, sum er tingmaður í Hetlandi og skrivari í stóra olju- og ídnaðarsamtakinum í Hetland og so stjórin á flogvøllinum í Sumbourghead Barry Stevens.

Hetta er helst fyrstu ferð, at ein løgmaður er boðin til Hetlands á almenna vitjan.

Herfyri varð løgmaður boðin at vitja í Bretlandi. Tann vitjanin verður helst í ár.

Johan Mortensen, bretskur konsul í Føroyum sigur við Sosialin, at tað er hugaligt, at høgstandandi føroyskir politikarar verða boðnir til Bretlands.

Eg haldi tað er upp á tíðina, at vit royna at fáa betri samband millum londini bæði. Her er jú talan um grannalond, sum gjøgnum tíðina hava havt nógv samskifti. Tað kann ikki vera rætt, at tað als ikki skal vera nakað politiskt samband millum londini, og tí eri eg sum bretskur konsul sera fegin um, at Løgmaður verður boðin til Hetlands at vitja.

Johan Mortensen heldur eisini, at fundurin millum løgmann og bretska uttanríkisráðharran herfyri fer at virka sum eitt járnbrot í royndunum at fáa eitt tættari samband millum Føroyar og Bretland.

Teir báðir hetlendingarnir høvdu í gjárkvøldið fyrilestur í felagnum Føroya Oljuídnaður. Har skuldu teir tosa um nýggja oljuøkið vestan fyri Hetland og hvønn týdning hetta kann fáa fyri ikki bert Hetland men eisini Føroyar.

**jan**



*Peter Malcomson, sum vegna tingið í Hetlandi hevur boðið løgmanni at vitja. Her er hann á ráðstevnuni í Aberdeen í fjør. Mynd jan*



*Johan Mortensen vónar ikki í, at fundurin millum løgmann og Douglas Hurd herfyri fer at kunna virka sum járnbrot í royndunum at fáa størri samarbeiði í lag millum Føroyar og Bretland*